# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Føroyingar elska bretskan fótbólt, og tí eiga vit at heinta meiri íblástur haðani. Vit skulu skapa sterkar, skjótar og sannførdar spælarar sum teir bretsku, ið samstundis eru tekniskt og taktist so væl fyri sum teir føroysku*

*Uni Arge*

# Góðkendir debutantar

**Føroyski landsliðsvenjarin er ikki heilt ónøgdir við dystin móti Portugal, hóast hann harmast um, at mótstøðan seinastu fimm minuttirnar broytti sigur til stórsigur**




*Føroyski landsliðsvenjarin var sum heild nøgdur um avrikið. Men hann harmaðist stórliga, at portugisar skoraðu trý mál seinastu løtuna av dystinum*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Vit spældu móti einum væl sterkari liði, enn vit eru von við, og hóast vit at enda taptu stórt, so eri eg stórt sæð nøgdur við okkara innsats. Síggja vit burtur frá teimum seinastu minuttunum, so gjørdu vit ein góðan innsats líka til portugisar komu framum 3-0 í 86. minutti.

Soleiðis ljóðar viðmerkingin frá Jógvani Martin Olsen, landsliðsvenjara, um landsdystin í gjárkvøldið. Føroyska ferðalagið nýtti fyrrapartin í dag at ferðast í, og tí eydnaðist okkum ikki at fáa nakra viðmerking frá venjaranum ella spælarum, men á heimasíðuni hjá FSF letur Jógvan Martin tó væl at.

- Eg haldi, at verjan stóð seg væl, serliga tá hugsað verður um hvussu óroynd hon er. Debutantarnir gjørdu eitt sera gott avrik í mun til mótstøðuna, teir fingu í sínum fyrsta landsdysti. Eisini helt eg, at Bogi Løkin kláraði seg væl á miðvøllinum, sigur Jógvan Martin Olsen.

Landsliðsvenjarin royndi til eina nýggja leikskipan, sum var nógv meira verjukend, enn til undanfarnar dystir.

- Skipani vísti seg at rigga væl, og tykist væl hóskandi fyri okkum tá vit møta liðum, sum eru munandi sterkari enn vit, og har vit reelt ikki hava møgleikar at hava nakað skipað álopsspæl.

- Skal eg taka í egnan barm, so má eg viðganga, at tær seinastu útskiftingarnar ikki hepnaðust serliga væl. Tær órógvaðu spælið ov nógv, og liðið náddi ongantíð at umskipa seg, og tað var júst í hesum tíðarbili, at trý tey seinastu málini komu.

- Men bæði Christian Høgni og Mikkjal gjørdu tekin um, at teir vildu sleppa út, og tað er orsøkin til tær útskiftingarnar, sigur Jógvan Martin Olsen, sum samanumtikið er vónsvikin yvir stóra tapið.

# Hann gjørdi tað aftur

**Usain Bolt av Jamaica gjørdist í gjár fyrsti rennarin í 20 ár, sum hevur vunnið OL-gull á bæði 100 og 200 metrum. Samstundis setti hann nýtt heimsmet, tá hann rann 2/100 sekund undir gamla metinum hjá Michael Johnson**

**OL**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann er heimsins skjótasti maður. Eingin ivi um tað!

Usain Bolt av Jamaica køvdi annars ovurstóra spenningin undan 100 metra finaluni, tá hann hálvgum einsamallur spákaði sær til nýtt heimsmet á 100 metra teininum um vikuskiftið.

Men 100-meturin er ikki tann renningin, sum Bolt sjálvum dámar best. Hann sigur seg trívast betur á 200 metrum, og eftir uppvísingina leygardagin mundi fáur ivast í, at hann var risafavorittur at vinna gull á 200 metrum eisini. Nakað sum eingin hevur gjørt, síðani Carl Lewis fekk skrivaraborðsgull á 100 metrum í 1988, eftir at sigurin hjá Ben Johnsson varð koll-dømdur.

Tí var spurningurin einamest, um Bolt hevði møguleika at taka metið hjá legendariska Michael Johsson, sum í 90'unum var mest sum flúgvandi á 200 og 400 metrum.

Sjálvur hevði Johnsson undan finaluni í gjár sagt, at hann ikki trúði uppá, at Bolt kundi taka metið, men Jamaica-búgvin prógvaði tað øðrvísi.

## Tveir vrakaðir

Finalan á 200 metrum fekk tó eitt dramatiskt eftirspæl. Tá allir vóru komnir um málstrikuna, helt Wallace Spearmon úr USA, at hann hevði vunnið silvur, men hetta varð ógyldað, tí Spearmon hevði traðkað uttan fyri sína breyt.

Og tað sama hendi fyri Churandy Martina av Hollendsku Antillunum. Hann kom annar á mál sum nummar trý, men eisini hann hevði traðkað uttan fyri breytina.

Tí endaði alt við, at Shawn Crawford úr USA vann silvur, meðan Walter Dix, eisini úr USA, vann bronsuna.




*Usain Bolt kundi veruliga reypa sær. 21 ára gamli Jamaica-búgvin hevur seinastu vikuna vunnið gull á báðum sprint-teinunum, og í báðum førum varð talan um nýtt heimsmet*

*Mynd: Polfoto/AP*